# Fegin um nýtt dag

**Nógv fólk, ung sum gomul, nýttu høvið at støkka inn á gólvið í nýggja dagtilhaldinum, sum lat upp í Nólsoy í gjár. Fólk eru fegin um hendan nýggja møguleikan til eldri**



*Hilmar Joensen spælir harmoniku til felagssang. Við síðuna av Hilmari, Heinina Gaard Hansen, Lis Hansen, Jónvør Christiansen (handan bl*

DAGTILHALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur verið arbeitt leingi við ætlanunum um eitt dagtilhald fyri eldri í Nólsoy. Eftir at Tórshavnar og Nólsoyar kommunur løgdu saman 1. januar 2005, hava allar kommunalar uppgávur áligið Tórshavnar kommunu. Og innan eldraøkið hava tað serliga verið Jónvør Christiansen og Lis Hansen, sum hava tikið sær av Nólsoy.

Jónvør Christiansen greiddi í røðu síni á móttøkuni frá, hvussu tilgongdin hevði verið. Tað byrjaði við tankanum, og tað vísti seg beinanvegin, at sovæl umsiting sum politiski viljin vóru positiv innatillað, so skjótt var spurningurin bara hølisviðurskiftini.

Mest upplagdu hølini vóru tey hjá Avhaldsfelagnum í bygdini, men har eru trappur og tískil ikki egnað til illa gongd ella fólk í koyristóli. Sama støðan er við ungmannafelagshúsinum, har hugnahølið er uppi á.

Tá so møguleikin beyðst at keypa sethúsini hjá gamla lærаranum í Nólsoy varð gjørt av at hyggja at teimum, og vístu tey seg sera vælegnað, serliga tí tey vóru í einari hædd. Gjørt varð av at keypa, og nýta tey til dagtilhald.

Hesi sethúsini liggja sum nærmasti granni hjá Missiónshúsinum, sum vóru nýtt til barnagarð, men av tí at tørvurin á húsplássi var so stórur í barnagarðinum, varð gjørt av at nýta hesi húsini til vøggustovu, inntil nýggi barnagarðurin í bygdini var liðugur.

## Snøgg hølir

Tá so vøggustovan var flutt út, var farið undir at broyta og rigga húsini til, so tey kundu taka ímóti brúkarunum. Størstu broytingarnar vóru, at tey bæði WC'ini í húsinum vóru gjørd munandi størri, og at allar hurðar vóru skiftar út við breiðari hurðar, so koyristólar ótarnaðir kundu koyra ígjøgnum.

Gólvini vóru eisini skift, men sjálv innrættingin er sum so einki broytt.

Hølini eru sjálvandi snollað upp, málað, og so hevur fyriskiparin, Patricia Christiansen, vanliga nevnd Disa, funnið gamlar myndir úr Nólsoy fram, sum prýða veggirnar í høvuðshølunum, ella stovuni.

Hølini eru sera hugnalig, og bera meiri brá av einum vanligum heimi enn av einum stovni.

Hølini innan eru liðugt umvæld, og ein rampi er gjørdur úr túninum til innhurðina, men enn vantar ein rampi av vegnum niður í túni. Hesin skal gerast, men til ber kortini at sleppa inn við koyristóli gjøgnum garðin hjá Missiónshúsinum, tí portur er á millum húsini bæði.

## Hugnalig móttøka

Í gjár var sum nevnt móttøka í nýggja dagtilhaldinum, og nógv fólk, ung sum gomul, nýttu høvið at støkka inn á gólvið til deiliga fiskasuppu og te ella kaffi við køku afturvið.

Sum nevnt vóru umboð fyri kommununa, tilhaldið og heimatænastuna úti í Nólsoy í sambandi við upplatingina, og tær høvdu allar fýra góð orð at bera við á vegnum. Eisini Disa segði nøkur orð, og mintist eitt nú aftur á, tá hon fyrstu ferð kom til Nólsoyar í 1958, at verða dadda hjá millum øðrum Hilmari Joensen, sum tey nógvu seinastu árini hevur verið lærari í Nólsoy.

Hesin sami Hilmar Joensen setti sín serliga dám á hesa móttøkuna, tá hann við harmoniku skipaði fyri felagssangi. Trivið var í fleiri nólsoyarsangir, sum pápi Hilmar, Jákup Joensen, hevur yrkt, og ógvuliga passandi varð byrjað við Nólsoyarvalsinum, sum Leif Hansen hevur yrkt. Og nýggja dagtilhaldið heldur til júst í gomlu setúsunum hjá Leif Hansen.

Eisini spældi unga Anna Malan Jógvansdóttir nøkur løg á fiól.

Ein av teimum, sum væntandi fer at hava sína gongd í nýggja dagtilhaldinum, er fróðarmaðurin Høgni Thomsen, og hann vísti síni kynstur sum frásøgumaður, tá hann hugleiddi um ein túr til neytar, hann gjørdi við systur síni, níggju ára gamal.

Fólk eru sera fegin um, at bygdin nú hevur fingið dagtilhald. Higartil hevur verið skipað fyri hugnakvøldi einaferð um vikuna í Avhaldshúsinum, har kortspæl fyri tað mesta er á skránni, og sum skilst heldur hetta fram. Kortspæl er mikukvøld, meðan dagtilhaldið verður opið mánadag, týsdag og hósdag. Mánadag frá klokkan 13 til 18, hinar báðar dagarnar frá 10 til 18.



*Anna Malan Jógvansdóttir hugnaði um við fiólspæli. Á sofuni situr Heinina Gaard Hansen og tað er fyriskiparin, Disa Christiansen, sum heldur nótunum fyri Onnu Maluna*